## TILTØK AUGUST 2004

**Framsýningin "Veiðimentan" er á Etnografisk Museum í Stockholm til 23. september 2004**

**Tróndur Patusson framsýning í Müllers Pakkhús frá 6-15. august 2004.**

**Atlantic Music Event, konsert við Eivør Pálsdóttir, Gestir og Makrel í VEGA í Kbh. 28. august 2004**

FRÍGGJADAGUR 06. AUGUST
**Listastevnan 2004**

LEYGARDAGUR 07. AUGUST
**Listastevnan 2004**

SUNNUDAGUR 08. AUGUST
**Listastevnan 2004**

MÁNADAGUR 09. AUGUST
**Listastevnan 2004**

TÝSDAGUR 10. AUGUST
**Listastevnan 2004**

MIKUDAGUR 11. AUGUST
**Listastevnan 2004**

HÓSDAGUR 12. AUGUST
**Listastevnan 2004**

FRÍGGJADAGUR 13. AUGUST
**Listatstevnan 2004**

LEYGARDAGUR 14. AUGUST
**Listastevnan 2004**

SUNNUDAGUR 15. AUGUST
**Listastevnan 2004**

FRÍGGJADAGUR 20. AUGUST
**kl. 14.00** **Fyrilestur við Bjørn Lomborg**
Fyrireikari er Vinnumálaráðið

SUNNUDAGUR 29. AUGUST
**kl. 09.00** **20. Norðurlendska Rúsevnisráðstevnan,**
Fyrireikari er Fyribyrgingarráðið.

MÁNADAGUR 30. AUGUST
**kl. 09.00** **Norðurlendsk Rúsevnisráðstevna,** framhald

TÝSDAGUR 31. AUGUST
**kl. 09.00** **Norðurlendsk Rúsevnisráðstevna,**
sísti dagur!

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**


**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**


# FORKUNNUGIR FILMAR



**Sum vant bjargar Listastevnan filmsáhugaðum filmsperlur, sum annars hava ilt við at vinna vegin fram til Føroya.**

Havnar Bio gevur pláss fyri fimm nýggjum filmum listastevnuvikuna, bæði altjóða og norðurlendskum. Filmarnir eru "Garfield", "Ondskan", "Lad de små børn", "Lost in translation" og "Salmer fra Kjøkkenet".

### Garfield



Aftur hesaferð verður okkurt til børnini. Filmurin um heimsins kendasta kettu, Garfield, verður sýndur, so leingi Listastevnan er. Filmurin byggir á teknirøðina, sum verður lisin av meira enn 260 milliónum lesarum kring heimin.

Í filminum fær kensluleysi, dovni og altíð gorhungraði fressurin Garfield ein hundahvølp í húsið. Tað hóvar honum lítið, men tá ið hvølpurin verður burturfluttur av einum óndum hundavenjara, fær Garfield skuldarkenslur og kennir seg noyddan at hjálpa honum.

Tað er nýliga, at Garfield gjørdist filmsstjørna. Filmurin hjá 20th Century Fox var frumsýndur í USA 25. juni. Á Listastevnuni verður hann sýndur 6.-15. august.

### Ondskan

Svenski filmurin "Ondskan" byggir á ta legendarisku skaldsøguna hjá Jan Guillous um sín egna barndóm. Jan Guillous er annars mest kendur fyri sínar njósnarasøgur um Hamilton. "Ondskan" varð innstillaður til ein Oscar í vár sum besti útlendski filmur.

Filmurin snýr seg um Erik Ponti, sum mamman sendir á kostskúla, tí hann verður blakaður úr skúlanum. Ungi drongurin finnur skjótt útav, at teir eldru dreingirnar hava alt vald á skúlanum, meðan teir ungu dreingirnir verða útsettir fyri eitt sindur av hvørjum, uttan at lærararnir lyfta hond frá síðu.

"Ondskan" er, sum tittulin sigur, um sannan óndskapin. Men hóast tað er ein syrgilig søga um harðskap og ræðslu, so fær kærleikin og eydnan eisini innivist. "Ondskan" í Havnar Bio 6.-9. august.

### Lad de små børn

"Lad de små børn" er ein danskur filmur, sum kendi sjónleikurin Paprika Steen hevur leikstjórnað.

Filmurin er um Claes og Britt, sum missa dóttrina í eini ferðsluvanlukku. Tey bæði hava torført við at koma víðari í lívinum. Claes vil hava hevnd og finnur í loyndum kvinnuna, sum drap dóttur hansara. Britt kastar hinvegin allan sín alsk á eitt barn, sum verður tvingsilsflutt úr heimi sínum. Filmurin lýsir við øðrum orðum støðuna, tá ið fólk eru undir trýsti og eru fyri stórum tapi.

"Lad de små børn" í Havnar Bio 10.-12. august.

### Lost in translation



Amerikanski filmurin "Lost in translation" er um tvær einsamallar sálir úr Amerika, sum finna saman í Tokyo. Filmurin viðger einsemi og glatan fremmandum landi.

Sofia Coppola hevur gjørt filmin. Høvuðspersónurin er sjónleikarin Bob Harris, sum er farin til Tokyo at luttaka í eini reklamuherferð fyri whiskey. Har kemur hann fyrst í samband við sítt einsemi, men alt fær eina vend, tá ið hann hittir ungu Charlottu.

"Lost in translation" vann tríggjar Golden Globes í vár. 6.-9. august verður hann sýndur í Havnar Bio.

### Salmer fra Kjøkkenet



Síðsti filmurin, sum verður sýndur á Listastevnuni á hesum sinni er norski skemtifilmurin "Salmer fra Kjøkkenet".

Eftir seinna heimsbardaga varð húsmóðurin og hennara arbeiði í køkinum hálovað og lýst út í æsir. Filmurin fer eitt stig víðari. Nú skulu teir giftu menninir lýsast. 12 svenskir eygleiðarar koma til Noregs at kanna, hvussu ógiftir menn klára seg í køkinum.

Filmurin er um vinarlag og einsemi. Havnar Bio 13.-15. august.

# EIVØR Í ÍRSKUM OG ÍSLENDSKUM SAMSTARVI

**Okkara egna Eivør er føroyska klipið í einum spennandi listarligum samstarvi millum Ísland og Írland, sum verður framført á Listastevnuni 15. august í Norðurlandahúsinum**



Samstarvið hevur staðið sína roynd á Listahátíð Reykjavíkar í mai og á írsku listastevnuni í juni í ár. Rósurnar hava verið mangar, og tað er ikki so løgið, tá ið hugt verður eftir teimum, ið hava lagt sínar gávuríku kreftir í tiltakið.

Talan er um eitt samstarv, har tónlistaarvur og nýskapan í hesum tónlistarligu stórveldunum í Norðuratlantshavi verða samansjóðað.

Tveir av fremstu tónlistamonnunum í Íslandi og Írlandi, Donal Lunny og Hilmar Örn Hilmarsson hava lagt til rættist og hópin av evnaríkum írskum og íslendskum solistum eru við. Og millum teirra, ið vaktu miklan ans, var so eisini føroyska Eivør Pálsdóttir.

### Víðagitnir fyriskiparar

Donal Lunny er ein tann fremsti írski tónlistamaðurin. Hann verður kallaður faðirin at teirri nýggju írsku tónlistini, sum byggir á tjóðararvin. Hann hevur havt stjørnur sum Sinead O'Connor, Elvis Castello, Kate Bush, Paul Brady og Rod Stewart undir sínum veingjabreiði og er kendur úr mongum ymiskum høpi.

Bono í U2 kallar rætt og slætt Donal Lunny fyri "mann ljóðsins" í írskari tónlist og sigur hann eiga størsta heiðurin fyri, at írskur tónleikur hevur vunnið so stóran altjóða heiður síðstu árini.

Íslendingurin Hilmar Örn Hilmarsson hevur roynt mangt og hvat. Kanska hevur hann vunnið mest heiður fyri at hava skrivað filmstónleik, m.a. til filmin Náttúrinnar børn. Hann hevur eisini skrivað tónleik til Bye Bye Bluebird eftir Katrin Óttarsdóttir.

### Nógvir solistar

Listin er langur yvir fólk, sum stíga fram í sjáldsama samstarvinum. Teirra millum er sangarin í Blur, Damon Albarn, og kvæðamaðurin Steindór Andersen úr Íslandi. Tónleikabólkurin er mannaður við fremstu tónleikarunum í Íslandi og Írlandi.

Eingin Listastevna uttan Eivør. Hon smæddist ikki burtur á listastevnunum í Íslandi og Írlandi. Tá sang hon eitt føroyskt skjaldur og tvey egin løg, og spennandi verður at hoyra, hvussu tey ljóða í hesum fína selskapinum.

Eivør, Eire og Ísland í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið 15. august klokkan 13.30.

# STØRSTU NØVNINI HIGARTIL

**Listastevnan 2004 er tann størsta higartil, hvat heimskendum nøvnum viðvíkur. Kiri Te Kanawa, Jethro Tull, Celtic Tenors og okkara egni Teitur savna helst tey flestu fólkini**

Um fáar dagar byrjar Listastevnan 2004. Operasangarinnan Kiri Te Kanawa er uttan samanbering størsta navnið hesaferð, og hon er helst kendasta listafólk uttan úr heimi, sum nakrantíð hevur vitjað Føroyar.

Sangskráin fevnir um klassiska operu, sanglist frá mætum komponistum og harumframt syngur hon eisini populertónleik. Hon er høvuðsnavn, hvar hon so syngur, og klaverspælið stendur navnframi Julian Reynolds fyri.

Jehtro Tull telist millum stóru progressivu rock-nøvnini frá síðst í 60-árunum og upp gjøgnum 70-árini. Maðurin við gyltu tvørfloytuni, Ian Anderson, gleðir seg nógv at koma til Føroya. Og so nógvir føroyingar gleddust um at fáa hann hendanvegin, at útselt var eftir fáum døgum, hóast Norðurlandahúsið hevur lagt seg skerflatt fyri at fáa so nógv inn sum gjørligt.

Jehtro Tull hevur vanliga 100 konsertir um árið, teir hava selt meira enn 60 milliónir plátur og fløgur og hava havt meira enn 2500 konsertir í trý áratíggju. Nú kom so túrurin til Føroya.

Celtic Tenors teljast helst eisini millum høvuðsnøvnini í ár. Talan er um tríggjar ungar tenorar, ið m.a. syngja kendar sangir hjá Dubliners, Beatles og Quenn. Við sær hava teir írsku sopransangarinnuna Deirdre Gilsenan, sum hevur sungið fyri fullum húsum kring allan heimin.

Okkara egni Teitur er eisini á Listastevnuni, eftir eitt langt ár við óteljandi konsertum í USA, Evropa og Skandinavia. Nú er hann loksins aftur í Føroyum, har føroyingar fáa høvi at hoyra, hví hann hevur megnað tað, sum hini droyma um.

Teitur er sín egni, spælir sín egna tónleik á sín egna hátt, og ummælarar eru vorðnir hugtiknir av hansara




tankavekjandi tekstum og hugfangandi løgum. Við sær hevur hann Mads Andersen og Michael Blak.

## EITT GOTT HETLENDSKT BOÐ



Fiddler's Bid er eitt gott boð uppá, hvussu samstarvið við Hetland skal røkjast.

Teir sjey hetlendingarnir, sum spæla í Mentanarhúsinum og á Platform á Listastevnuni, fáa heilt vist fólk í gott lag við sínum kvika hetlendska fólkatónleiki.

Fiddler's Bid eru fýra fiólsnillingar, ein klaverspælari, ein bassistur, ein gittarspælari og ein hørpuspælari. Bólkurin hevur givið fýra fløgur út og hevur vakt ans í so fjarskotnum londum sum USA og Australia.

Fiddler's Bid eru at hoyra í Fuglafirði 12. august klokkan 20 og á Platform í Havn 13. august klokkan 22 (aftaná konsertina hjá Teiti í Norðurlandahúsinum).

## SÁPUBLØÐRUR TIL VAKSIN OG BØRN



Aftur í ár bjóðar Listastevnan eitt tiltak á høgum listarligum støði, sum er ætlað allari familjuni

Í fjør var tað dóttir Charles Chaplin, Victoria Chaplin og maður hennara, Jean Baptiste, sum hugtóku smá og stór við einum sirkus. Við sær høvdu tey serligar kaninir, dunnur og nøkur onnur smærri dýr.

Í ár eru tað sápubløðrurnar, sum skulu fáa børnini upp úr stólunum. Tað er Pep Bou, sum skapar ein heim av sápubløðrum. Stórar, lítlar, roykfyltar, litfagrar og lýsandi sápubløðrur.

Pep Bou samantvinnar sín flótandi heim við skaldskapin hjá Joan Brossa. Hetta kallar hann Ambrossia. Í byrjanini eru sápubløðrurnar vanligar, men so hvørt verða tær flottari og størri, meðan tónleikur hoyrist í bakgrundini.

Bløðrurnar geva meining í sjálvum sær, og saman við sínum klossuta hjálpara gevur Pep Bou eina stuttliga framførslu, ið heilt sikkurt fær børn og vaksin at flenna og hugsa.

Kostnaðurin er 175 krónur fyri vaksin og 125 krónur fyri børn. Ambrossia í Norðurlandahúsinum mánakvøldið 9. august klokkan 19.30.

## RÆÐULEIKAR ÚR STALINGRAD OG DUKKUR ÚR TBLISI



Eitt spæl við dukkum, ið lýsir ræðuleikarnar í kríggi, eru vit ikki von við. Men tað er júst tað, sum ein dukkuleikur úr Georgia hevur at bjóða á árins Listastevnu

Slagið um Stalingrad var eitt tað blóðugusta í øllum seinna heimsbardaga, og tað er hendan bardaga, sum Tblisi Municipal Theatre Studio lýsir á Meiarínum týsdagin 10. og mikudagin 11. august.

Leikurin snýr seg um ræðuleikarnar, tá ið týskir og russiskir hermenn til fánýtis stríddust um russiska býin, sum varð knústur sundur undir krígnum. Leikurin við teimum 38 marionettdukkunum, sum allar hava sína egnu persónsmensku, er tó ikki bara um neyð og elendigheit. Her eru eisini stuttligar og sigandi løtur, sum seta alt í perspektiv.

Handritið til leikin hevur Rezo Gabriadze skrivað. Hann noyddist at rýma, tá ið borgarakríggj brast á í Georgia, men hann kom aftur og endurstovnaði sítt sjónleikarahús, sum nú lendir á Listastevnuni.